# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur...*



Kult-høvundurin:
## Douglas Coupland



Fyri Douglas Coupland dyrkarar varð bókin *Generation X*, sum kom út í 1991, bara byrjanin til eina røð av bókum eftir høvundan, sum skjótt fingu kult støðu millum tey ungu. Við seinni bókum sum *Girlfriend in a Coma, Shampoo Planet* og *Microserfs* staðfesti Coupland sína støðu sum kult høvundur og sum ímyndin av tíðandanum í 1990 unum. Men hóast tey ungu kendu seg sjálvi aftur í sýruta umhvørvinum og skrivingarlagnum hjá Coupland, avdúkaði hann teirra ironiserandi líkasælu, meir enn hann nakrantíð endurspeglaði hana. Og sum frá leið nærkaðust hansara bøkur eisini so so mikið jørðini, at kult støðan tykist vera farin frá teimum.

Nýggjasta bókin hjá Coupland, *Eleanor Rigby*, sum kom út á donskum herfyri, snýr seg ikki óvæntað um einsemi. Høvuðspersónurin, tann 36 ára gamla, ovurtjúkka Liz Dunn, kennir seg líka einsamalla og onkisigandi, sum ein McDonald's serviettur. Inntil ættleiddi, álvarsliga sjúki sonur hennara knappliga ger vart við seg og flytir inn til hana. Frá einum degi til annan fær meiningsleysa lívið hjá Liz, um ikki eina meining, so eina nýggja avbjóðing, sum fær hana at rakna við og minnast, hvør hon kanska einaferð var.

Fyri stuttum legði Coupland seinastu hond á sítt fyrsta filmshandrit. Innihaldsliga leggur søgan seg tætt at kendum Coupland temaum, tá tað knappliga gongur upp fyri unga høvuðspersóninum, at alt hansara lív fer við at skriva um lottovinnarar í blaðnum hjá somu lottofyritøku. Ætlandi byrja filmsupptøkurnar einaferð í summar.

**ave**

*Douglas Coupland, Eleanor Rigby, 2004 Umsett Svend Ranild, Eleanor Rigby, Borgen, 2005*



# Eg og bøkurnar



*Allar tær ymisku meiningarnar um yvirtøkulógina hava verið fínur "skaldskapur", heldur John Johannesen*

**John Johannesen, løgtingslimur**

*Hvørja bók lesur tú í løtuni?*
Fyri tíðina hevur ógvuliga nógv verið at gjørt í tingarbeiðinum, so eg havi fyri tað mesta lisið løgtingsmál og tilfar, ið hartil hoyrir. Men tað hevur ikki verið keðiligt kortini. Allar hesar ymisku meiningarnar um yvirtøkulógina hava verið fínur skaldskapur – he he.

Annars las eg *Da Vinci Mysteriet* eftir Dan Brown fyri stutt síðani. Ein bók, sum hevur megnað at gerast bannað í ymiskum høpum. Mær dámar skaldsøguna væl. Haldi, at høvundurin dugir serstakliga væl at tvinna filosofi, átrúnað og krimi saman til eina fangandi søgu, sum tú ikki kanst leggja frá tær, fyrr enn tú ert liðugur at lesa.

Havi beint í løtuni *Boghandleren fra Kabul* eftir norsku tíðindakvinnuni Åsne Seierstad liggjandi á náttborðinum. Men havi ikki havt stundir at byrja uppá hana enn.

Halgubók lesi eg eisini regluliga – og tað dámar mær væl.

*Nevn eina bók, tú minnist serliga væl?*
Veit ikki ordiliga. Men kanska tað var, tá eg sum tannáringur las *Animal Farm* hjá George Orwell. Stóra bindið við yrkingum eftir Janus Djurhuus er eisini nakað, sum eg taki fram við jøvnum millumbilum. Tað havi eg gjørt, síðani eg las Janus Djurhuus fyrstu ferð.

*Hvør var fyrsta bókin tú las?*
He he. Man tað ikki hava verið ein Jumbobók hjá Disney, um hetta kann fatast sum bókur. Eg las í øllum førum nógvar av teimum, sum smádrongur. Minn-ist eisini, at Disney hevði eina bókarøð við ymiskum ævintýrum, m.a. eftir H. C. Andersen. Hesi minnist eg, at pápi las fyri mær.

*Hvørja bók vildi tú ynskt tú hevði lisið?*
Tað eru so nógvar, at eg kann ikki seta orð á eina beint nú. Men her á hillini beint framman fyri mær stendur *Aschenhougs Store Bog Om At Holde Tale.* Kanska skuldi eg lisið hana nakað skjótt. Nei, tvætl. Kundi hugsað mær at komið ígjøgnum eitt sindur meira av tilfarinum hjá Shakespeare og so kanska okkurt hjá Dostojevski eisini. Haldi sjálvur, at eg havi lisið ov fá av heimsins stórverkum.

*Hondina á hjarta – lesur tú altíð eina bók lidna?*
Nei, eg lesi ikki altíð eina bók lidna. Serliga ikki, tá talan er um fakbøkur av ymsum slag. Tá velji eg mær gjøgnum innihaldsyvirlitið tey brotini, sum eg haldi vera viðkomandi. Annars kemur tú aldri ígjøgnum alt tað, ið tú ætlar.

**ave**

Bókatíðindi:
## Óforsvarligt!

Hvat er í grundini galið við, at ítróttarfólk dopa seg? Og hví skal tað vera ólógligt at selja eitt atgongumerki víðari við vinningi? Ella hví ikki bara lata rockarar drepa hvønnannan, um tað er tað, teir vilja?



Í eini røð av gløggum og tankavekjandi styttri greinum í Weekendavísini hevur Christopher Arzrouni vart sjálvt ringastu brotsmenn og provokerað stórt sæð allar frelstar sannføringar um umstrídd evni. Sera undirhaldandi greinarnar hjá Arzrouni eru nú savnaðar í bókini *Helt uforsvarligt!*, sum Gyldendal gav út mikudagin.

## Áheitan

Føroya Landsbókasavn heitir á fólk um at hjálpa at fullfíggja søvnini við titlum, ið vanta.

Ein av uppgávunum hjá Føroya Landsbókasavni er at savna allar føroyskar bókmentir og allar útlendskar bókmentir um føroysk viðurskifti umframt allar



bókmentir eftir føroyskar høvundar. Ymiskt vantar tó í søvnunum, og tí heitir Landsbókasavnið á tey, ið hava møguleika at fullfíggja søvnini við onkrum titli, um at seta seg í samband við Landsbókasavnið.

Á heimasíðini hjá Føroya Landsbókasavni, www.flb.fo , ber til at síggja eitt yvirlit yvir titlar, ið vanta í søvnunum – sonevndir "desiderata".

**ave**

Viðmæli:
## Søgan hjá Saynab

*Turið Kjølbro*

*Eva Norderhaug, Saynab min historie, Aschehoug, 2004*

*Saynab min historie* er heitið á bók, ið unga somaliska kvinnan Saynab hevur skrivað saman við kendu norsku tíðindakvinnuni Evu Norderhaug. Og Saynab hevur sanniliga eina søgu at fortelja. Sum tólv ára gomul kemur hon til Noregs sum flóttarfólk úr krígsherjaða Somalia saman við lítlabeiggjanum Abdi at vera saman við pápanum. Mamman er eftir í Somalia. Tíðin í Noregi er byrjanin til eitt hart lív, eitt lív við heimlongsli, einsemi, vansorgan, diskriminering, happing og ógvusligum harðskapi, og seinni eitt lív sum oddafiskur í ungdómsbandum. Alt rundan um hana er harðskapur, og einasti mátin at svara aftur er við harðskapi. Men ístaðin fyri at loysa trupulleikar, elvir harðskapurin til fleiri trupulleikar. Tíbetur dugir Saynab at síggja tað, áðrenn ov seint er.

Sum hon veksur upp, ger hon upp við egnu mentan og mentanina í landinum, hagar hon er flutt. Hon roynir at finna seg sjálva í meldrinum og fer undir eitt stríð móti kynsmeislan, sum hon rópar umskering av gentubørnum.

Seks ár eftir at Saynab og Abdi komu til Noregs, vitja tey heimlandið og mammuna aftur, men bert fyri eina stund, tí Saynab veit, at tað er í Noregi, hon kann gera mest gagn.

Saynab er í dag 26 ára gomul og starvast sum ráðgevi í tilflytaramálum í norsku ríkisumsitingini.

*Saynab min historie* er ein hugvekjandi bók, sum er skrivað á livandi, løttum og til tíðir talumálskendum máli. Og hon er avgjørt verd at lesa, ikki minst hjá ungfólki!

